## Jákup spældi kortini

Hvíld er einasta hjálpin, hava boðini kring Jákup á Borg verið, men hóast hetta, so var hann partur av HB-liðnum, sum fór á vøllin mikukvøldið. Í somikið týdningarmiklum dysti var niðurstøðan, at tað var royndina vert at brúka hann, og Jákup taldist eisni millum teir meira sjónligu á HB-liðnum. Enn er skaðin tó langt ífrá burturi, og sum skilst skal hann í øllum førum hvíla, tá HB sunnudagin spælir Inter-Toto bólt.

**-mørk**



## Klaksvíkingur tikin av Tjaldrinum

Norðlýsið skrivar á netinum, at Klaksvíkingur mikukvøldið varð tikin av sjóverjuni. Tað er krav, at róðrarmanningar hava bjargingarvestar, tá vant verður, og tað var hetta, sum sjóverjan kannaði í gjár. Tað vísti seg, at av teimum ellivu umborð á Klaksvíkingi, vóru bert tríggir mans í bjargingarvesti, so talan verður um bót fyri brotið.

**-mørk**

# oddasessin



*Fyri tað nógva megnaðu gøtumenn at stressa heimaverjuna, sum í tveimum førum framdi kostnaðarmikil mistøk*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**formuladeildin**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 13 | 7 | - | 5 | - | 1 | 21 | 11 | 10 | 26 |
| 2 | HB | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 30 | 17 | 13 | 24 |
| 3 | EB/S | 12 | 7 | - | 3 | - | 2 | 25 | 15 | 10 | 24 |
| 4 | NSÍ | 12 | 6 | - | 3 | - | 3 | 25 | 16 | 9 | 21 |
| 5 | KÍ | 12 | 5 | - | 5 | - | 2 | 26 | 14 | 12 | 20 |
| 6 | B36 | 12 | 5 | - | 5 | - | 2 | 16 | 13 | 3 | 20 |
| 7 | Skála | 12 | 3 | - | 2 | - | 7 | 14 | 14 | 0 | 11 |
| 8 | B68 | 12 | 2 | - | 2 | - | 8 | 11 | 21 | -10 | 8 |
| 9 | ÍF | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 13 | 31 | -18 | 7 |
| 10 | VB/S | 12 | 2 | - | 1 | - | 9 | 12 | 41 | -29 | 7 |

HB tóktist eisini hava meira bit í sær nú, og spakuliga royndu teir at trýsta spælið niðaneftir. Einstakar góðar royndir gjørdist talan eisini um, og eftir at Rókur av Fløtum Jacobsen púra blankur sendi bóltin í netið til 1-2, vaks nervin í dystinum av álvara. Fram til seinastu fimm minuttirnar tóktust gøtumenn tó ikki at hava teir heilt stóru trupulleikarnar. Vandin fyri einum kontra-máli lúrdi eisini alla tíðina, og bæði Gunnar Nielsen og Hans Jørgen Djurhuus høvdu sera góðar skotroyndir.

Seinastu løtuna gjørdist trýstið tó øgiligt. Gøtumenn bakkaðu alt meira, og eftir at Gunnar varð skiftur út, flutti HB mest sum alt fólkið fram. Ivaleyst var møðin orsøkin til, at troytti tveymálaskjúttin varð tikin av vøllinum, og í so máta var hetta skilligt. Men spurningurin er, hvørt tað ikki vildi verið fult so skilagott bara at havt hann inni, tí virðingin frá HB var somikið stór, at teir mest sum alla tíðina hildu tveir mans í nær námind Gunnari.

### Dýrur lærdómur

Skilabetri ella ikki, so munnu tey í GÍ ikki gremja seg kortini. Hildið varð fast um stigini fram til seinasta bríkslið. Fram til sunnudagin er liðið í øllum førum oddalið í Formula-deildini, og tað man so væl og virðiliga vera góðkent. Sjálvandi eru enn 14 dystir eftir at spæla, men longu nú eiga gøtumenn fleiri stig á kontini, enn teir gjørdu eftir 27 dystir í fjør.

Hjá HB mundi talan hinvegin vera um kalda pøs eftir góða úrslitið á Skála sunnudagin. Men talan var kanska samstundis ein áminning um, at tingini sjáldan koma av sær sjálvum í fótbólti. Umframt talent, so krevur tað fyrst og fremst hart arbeiði, og tann partin av læruni hevði HB gloymt góða løtu av dystinum.

## Erling millum teir vaksnu

Hóast tað stóð nógv á hjá GÍ, so valdi Petur Mohr at senda ein spildurnýggjan mann á vøllin í Gundadali. Erling Jacobsen er ein av spælarunum, sum í ár hevur strítt seg í Formula-hópin, og mikukvøldið slapp hann so fyri fyrstu ferð á vøllin í landskappingardyst, tá hann í 57. Minutti varð skiftur inn fyri Poul Arna Jacobsen.

**-mørk**



*Tað var vorðið sum debut, ið í ungi Erling Jacobsen fekk fyri besta GÍ-liðið. Í Gundadali móti HB, og enntá við einum sigri sum endaúrslitið*
*Mynd: Álvur*